# Kjak



Steinbjørn O. Jacobsen

## Tú trívist har tú verður møttur við virðing

*Sum flest øllum kunnugt eri eg í politiskum høpi tjóðveldismaður og havi verið tað, síðan eg sum ungur fekk áhuga fyri politikki og bleiv bitin av tjóðveldishugsjónini, sum hesin flokkur stóð og stendur fyri*

Fyri meg var, og er tað framvegis, ikki so avgerandi, um flokkurin var vinstraella høgravendur, tí báðar gravirnar eru líka vandamiklar. Tað finst eisini ein harðrendur politikkur í slíkum hugsjónum, um vit ikki vísa hógv. Hetta er nógv tengt at, hvør persónurin er, sum myndar politikk floksins, og hvussu langt viðkomandi fær loyvi at fara.

### Góðar fyrimyndir

Eg minnist við virðing limafundirnar á Klaksvíkar Sjómansheimi saman við nevndarlimunum í Norðoya Tjóðveldisfelag, m.a. Jóhannes Thomsen, Jósup Henriksen, Jóhann Simonsen, Kristian og Regin Hvidbro, Jógvan og Finnboga Isaksen, Holgar Poulsen, Linda Gardar, Hans Jacob Justesen, Fridtjof Joensen og Esbern Frederiksberg, væl stuðlaðir av konum teirra.

Allir hesir eru farnir inn í ævinleikan, og so tey, sum enn eru ímillum okkum, sum gingu á odda og myndaðu og samlaðu felagið við báðum beinunum á jørðini. Hesir persónar lupu ikki so framav, sum alt ov nógv hendir í dag.

Vit ungu kendu okkum væl millum teirra og blivu eggjaði av teimum og lærd at hava virðing fyri hvørjum øðrum, eisini teimum, sum ikki eru av somu sannføring.

Tað var m. a. saman við hesum monnum og kvinnum, eg fekk kjølfesti í hugsjón floksins. Vit kunnu spyrja, er nakað broytt í flokkinum, og er tað til gagns ella til ógagns.

### Sterkar hugsjónir

Tað er onki at taka seg aftur í, at burtursæð frá tjóðskaparliga stríðnum, var hjartamál floksins fiskivinnan, sum var, er og verður vinnuligi hjartatátturin í samfelag okkara, og tað var alt umráðandi at tillaga fiskivinnuna soleiðis, at hon skapti góð livikor hjá okkara kæru landsmonnum saman við teirra kæru og tjóð okkara.

Vit minnast, hvussu Erlendur Patursson sáli bardist fyri korum fiskimanna, og mangan stóð nógv á. Stríðið um fiskimarkið var ikki tað lættasta, men tað bar á mál.

Erlendur haltaði ikki til báðar síður; hansara sannføring var sterkari enn so. Sjálvandi megnaði hann tað ikki einsamallur, men hann gekk undan, og hetta var ein týðandi liður í at gerast enn meiri sjálvbjargin.

Gævi, vit kundu varðveitt hesar sterku hugsjónir, sum góvu rúmd og fortreytir fyri at byggja land uttan persónligan vinning fyri eyga og uttan egin áhugamál, sum mangan hava ávirkað støðutakan politikaranna.

### Virðing skapir álit og trivnað

Tað standa stórar avbjóðingar fyri framman, og týdningarmikið er, at vit lata eyguni upp fyri tørvinum hjá okkara borgarum, úr vøggu í grøv. Tey, ið slóðaðu undan okkum, hava uppiborið góð kor, "tá lívskvøldið kemur og sól fer í kav".

Tíðir broytast, og vit verða rivin við tíðarrákinum, sjálvt um tað mangan hevur ómetaliga óhepna ávirkan á tjóð okkara.

Tí mugu vit vera á varðhaldi og ikki svølgja øllum rátt og taka við tí, sum kemur á okkum uttanífrá, men søkja vísdóm fyri politisku støðutakan okkara, bæði kommunalt og landspolitiskt.

Vit eru føroyingar við okkara serligu siðbundnu mentan, sum kanska ikki altíð hóskar so væl til nýmótans útlendska tíðarrákið. Tó kunnu vit leggja okkum eftir altjóðagerðini, uttan at missa okkum burtur sum serstøk tjóð. Vit fara ikki illa av tí, heldur tvørturímóti.

Virðing skapir álit og trivnað, sum aftur kveikir hugin til íverksetan og at taka tøk. Tí er so umráðandi fyri okkum at vit leggja okkum eftir at hava og vísa virðing fyri hvørjum øðrum sum einstaklingum, og at vit læra at standa saman um felags fosturland okkara og tey virði, vit her eru felags um at eiga og røkja.

---



Páll Poulsen
*lærari*

## Skeiv yvirskrift í Dimmu

Dimmalætting hevur á forsíðuni grein um Tórshavnar Kommunuskúla við yvirskriftini "**Kommunu-skúlin í skammikrók**". Henda yvirskriftin er ikki sørt misvísandi, tí Kommunuskúlin hevur als onki at skammast fyri, men tað hevur eigarin av Kommunuskúlanum harafturímóti, so skal nakar í skammikrók, má tað vera Tórshavnar Býráð.

Sum lærari í Kommunuskúlanum havi eg verið errin, hvørja ferð skúlin og næmingar fáa rósandi umrøðu í fjølmiðlum, tað er sera hugaligt og tílík herðaklapp gera meg glaðan og ernan um starvið sum lærari. Tí er tað so hugstoytt, tá Býráðið ikki kann fáa upp í lag at seta skúlan í ein rímiligan stand.

Tíverri eru tað fleiri, sum meta tær atfinningar, sum starvsfólk, næmingar, foreldur og eisini arbeiðseftirlitið hevur at støðuni í tí gula bygninginum frá 1956 sum tað reina fjas, ið erkvisnir lærarar og grenjut foreldur finna upp á. Men kom tú ein túr í Tórshavnar Kommunuskúla - gakk tú norðan fyri skúlan, og tú sært eitt serligt litspæl á vegginum. - Einaferð var hann ivaleyst gulur, men nú skyggir hann eisini í nógvum grønum litum av øllum alguvøkstrinum. Hevði talan verið um sjálvlýsandi algur kundu gøtuljósini har gott verið slókt, og kommunan soleiðis spart nakrar krónur.

Innan í garðinum er bygningurin ikki stórt frægari: Finerplátur eru skrúvaðar í vindeyguni, sum eisini eru fest við fleiri jarnbesløgum, so tey ikki detta úr og volda til skaða á fólk, sum eru støðd í skúlagarðinum. Hesar pláturnar skuldu vera ein fyribilsloysn til tann nógv umtalaða heildarloysnin var framd, men nú hevur hendan fyribilsloysnin vart í umleið 2 ár, og pláturnar eru farnar at flusna, so vatn sleppur inn í millum, so rot og soppur er komið í. Uppskot um heildarloysn er gjørd, men so er stígur komin í.

Hyggur tú at betonggrundini og aðrastaðni á vegginum við, sært tú so nógvar mosagrónar rivur, at tað kundi væl verið nýtt til undirvísing í plantulæru. Sama skilið er uppi á takinum, tað er ikki reinsað í áratíggjur, so nú er ikki bert mosi á tí, men fleiri áragomul løg av mosa er vorðin til reina mold, kanska kundu næmingarnir í heimkunnleika fingið eina fitta eplaveltu har uppi.

Inni í skúlabygninginum sær ikki út til at vera so ringt, men veruleikin er, at bæði næmingar og starvsfólk kenna seg illa og fáa eyðkenni fyri ovurviðkvæmi í tí vánaligu inniluftini í stovunum. Sjálvt um næmingarnir eru úti hvørt fríkorter, og stovurnar verða luftaðar út ímeðan, er hetta ikki nøktandi. Bankar tú á pussið á vegginum, hoyrir tú at opið er innanfyri og í tí opinum eru bestu lívstreytir fyri soppar: Lívrunnið evni, væta og hiti.

Sjálvt um alt hetta hevur verið kendur veruleiki í fleiri enn trý ár nú, og kommunan hevur fingið boð frá arbeiðseftirlitinum um at fáa skil á, so er als onki hent.

Tá soppur var funnin í rúsuni, var hon stongd beinanvegin, tá soppur var staðfestur á politistøðini var hon stongd beinanvegin. Soppur er staðfestur í fleiri skúlum, men ongin teirra er beinleiðis stongdur, kanska halda myndugleikarnir at næmingar og lærarar tola betri sopp enn løgreglan og rúsukundar.

Nei, nú haldi eg tað er nóg mikið bíða:

**Tórshavnar Býráð:** Takið tykkum um reiggj og setið umvælingina av kommunuskúlanum í gongd uttan drál!

**Mentamálaráðið:** Tit hava rætt til at seta tílík arbeiði í gongd fyri eigarans rokning – Gerið tað! og ábyrgdið Býráðið fyri forsømilsi tess.